# Tað er okkara ábyrgd



*Jan Eskild er farin út á aliringin, tí tað eina ljósið í ringinum riggaði ikki. Við síni kønu hond fekk hann tað at rigga aftur eftir lítlari løtu*

**Fyrstu 320.000 laksasmoltini hjá Vestlax vórðu sett út aftur framvið Argjalandinum seinasta summar. Millum teir, sum taka sær av teimum er víkarmaðurin Mikkjal Samuelsen, saman við starvsfelagum sínum, Jan Eskild Glyvradal og formanninum Rúna Ellingsgaard. – Hetta er eitt áhugavert arbeiði og eitt sera gott arbeiðspláss, sigur Mikkjal.**

ALIBRÚK
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens Kristian Vang*

**Nólsoyarfjørður:** Aling hevur áður verið á hesum staðnum, ið menn nevna í Gulanum, men nú er tað at meta sum eitt royndarøki.

Ætlanin er at halda fram og staðfesta, hvørt tað loysir seg at hava aling her í framtíðini – um tað gongur væl og um árgangurin verður góður.

Uppgávan hjá teimum trimum monnunum á alibrúkinum er tí í roynd og veru at tryggja, at fiskurin bæði er stórur og feitur.

Óhugsandi er ikki, at ein seinni fer at seta enn meiri laksasmolt út á hesum staði.

- Ja, tað hvílir ein stór ábyrgd á okkum, slær Mikkjal fast yvirfyri Sosialinum, sum vitjaði alibrúkið seinnapartin ígjár.

## Til tað dupulta

Á alibrúkinum her í Gulanum eru íalt fimm stórir ringar, her teir á ólavsøku í fjør settu út umleið 320.000 laksasmolt í hesar ringarnar.

- Umframt hesar fimm, hava vit tveir aðrar og smærri test-ringar, og í hesum ganga 5000 fiskar í hvørjum, greiðir Mikkjal frá.

## Kópur í eygsjón

Trupulleiki við kópi plagar at vera eitt kent fyribrigdi hjá alarum. Og herúti á Gulanum hava teir eisini merkt tað sama.

Mikkjal hevur áður arbeitt á alibrúki, har teir skutu nógvan kóp. Herúti hava teir ikki fingið rifluloyvi og tí er eingin kópur skotin enn.

Tað er helst eisini heldur long fjarstøða at skjóta hiðani av flakanum og út har sum kópurin er.

- Ein kann jú ikki bara skjóta í fleng og royna at raka. Skulu vit skjóta kópin, so mugu vit verða vísir í, at hann doyr, slær Mikkjal fast.

Hann kann tó staðfesta, at teir tíbetur hava ikki verið nógv plágaðir av kópi her í Nólsoyarfirði. Onkran dag hava teir sæð upp í tríggjar kópar, men so kunnu ganga fleiri dagar har teir ongan síggja.

- So seint sum í morgun sóu vit kortini aftur ein, sigur hann.